

Hetta kortið vísir, hvussu ætlanin er, at høvuðsvegirnir í Vági skulu nevnast. Hetta eru tó bert uppskot og býráðið fer at taka endaligu støðu seinni. Kortið hevur Munin gjørt

Nú fáa vágbingar at vita hvar teir búgva

Vágbingar hava havt nógv at tosa um seinastu tíðina, tí nú skulu allir vegir í Vági hava navn

GØTUNØVN
Áki Bertholdsen

Vágur: Nú verður spennandi at vita, hvar eg búgvi.

Hetta var bara ein viðmerking úr rúgvuni, tá ið vágbingar ein dagin fyri stuttum komu saman at tosa um gøtunøvn.

Allir vegir í Vági skulu nú hava nøvn og hvørt hús skal hava sítt nummar so nú fáa allir vágbingar at vita, hvar teir búgva.

Seinastu tíðina hava vágbingar gjørt uppskot um, hvussu 25 gøtur og vegir í bygdini skulu eita og síðani hevur ein gøtunavnanevnd mett um tey innkomnu uppskotini. Eitt fríggjakvøld nakað síðani var so almenn móttøka, har ið uppskotini vórðu løgd alment fram.

Men fyrireikararnir høvdu týðiliga undirmett áhugan hjá fólki fyri, hvussu gøtunøvnini skulu vera, tí fundurin varð lagdur at vera í Stóra Pakkhúsi og har var verri enn so pláss fyri øllum teimum mongu, sum høvdu ætlað sær á fund.

Martin Andreasen fekk fyrstu virðisløn í kappingini um gøtunøvn í Vági. Sjálvur býr hann í Fossagøtu, verður uppskotið fylgt. Dagfinn Olsen tók myndina av honum uttanfyri húsini í Fossagøtu

Og enn minni var pláss at vísa gøtunøvnini í uppvørpu, soleiðis sum ætlanin var.

Fimm vágbingar høvdu latið uppskot inn um, hvussu gøtunøvnini skulu vera og á samkomuni hetta sama fríggjakvøldið fingu tríggir teirra virðisløn handaða.

Palli Jacobsen fekk 3. virðisløn, sum var upp á 1000 krónur. Arnfinnur Bjarkhamar fekk aðru virðisløn og hon var 1500 krónur. Og 1. virðisløn, sum var 3.000 krónur, fekk Martin Andreasen.

Læknarnir funnu ikki

Ásgerð Stenberg, sum er formaður í mentanarnevndini í Vágs Býráð, segði, at nú er langt síðani, at kommunan fór undir arbeiðið at seta nøvn á vegir og gøtur í bygdini.

Arnfinnur Thomasen, sum hevur mannað gøtunavnanevndina, saman við Ebbu Skaalum, Torleif Augustinussen og Páll Jacobsen, segði, at nevndin hevði lagt dent á at varðveita tey gomlu staðanøvnini.

Eisini staðanøvn, ið mestsum eru farin í gloymskuna, hevur nevndin tikið framaftur.

Soleiðis verður nú skotið upp at kalla vegin, sum í mong ár vanliga hevur verið kallaður Lopransvegurin fyri Navargøta, tí gamla staðarnavnið er Inni á Nøvunum.

Annars hava eisini gamlir, kendir vágbingar fingið vegir uppkallaðar eftir sær, eitt nú Jákup Dahl, próvstur, Jóan Hendrik Schrøter, lærari og Magnus Dahl, vinnulívsmaður.

Sum heild tóku vágbingar væl undir við nøvnunum, men eftir fundin var kortini lívligt kjak um nøvnini.

Summi hildu, at okkurt navn kundi verið betri valt, og so vóur tað onnur ið spurdu, hví ikki tann og tann vágbingurin eisini fekk eina gøtu nevnda eftir sær, tá iðhin kundi fáa.....

Men øll tey, sum hava viðmerkingar til gøtunøvnini, kunnu gera vart við seg. Nøvnini, sum nú eru sett á, eru bert uppskot og ætlanin var júst, at geva fólki høvi at koma við viðmerkingum.

Seinni fer so Vágs Býráð endaliga at áseta gøtunøvnini.

Bróta reglugerðina

Í samrøðuna við Dan Reinert Petersen í gjár endurgeva vit hann fyri at siga, at tað stendur í viðtøkunum fyri Framtaksgrunnin, at hann skal selja fyritøkurnar, tá ið tær eru sølubarar.

Tá ið Framtaksgrunnurin ikki selir Fiskavirking, brýtur hann sostatt sínar egnu viðtøkur.

Dan Reinert Petersen ger vart við, at hann segði, at tað stendur í sjálvari reglugerðini fyri grunnin, at fyritøkurnar skulu seljast, tá ið tær eru sølubarar og hann heldur, at tað er rættari at brúka tað orðið.

Reglugerðin er oman fyri grunnin og er sostatt heilt bindandi fyri grunnin, sigur hann, men viðtøkurnar fyri grunnin kann nevndin sjálv samtykkja at seta í gildi og úr gildi aftur. Hinvegin hevur nevndin onga ávirkan á reglugerðina, men skal virka treytaleyst eftir henni.

Einki spart upp á Føroyar

Danmark hevur ongantíð brúkt Føroyar til at sleppa undan útreiðslum í NATO. Soleiðis sigur danska verjumálaráðið í einum avgjørdum svari til føroyanevndina hjá Fólkatinginum

VERJUÚTREIÐSLUR
Ingi Rasmussen

Føroyanevndin hjá Fólkatinginum fyrireikaði seg væl, áðrenn føroyaferðina herfyri. Nevndin setti Anders Fogh Rasmussen fleiri ítøkiligar spurningar, sum hon kundi vænta fóru at stinga seg upp á ferðini.

Forsætisráðharrin varð millum annað biðin um »en samlet opgørelse af det økonomiske mellemværende mellem Færøerne og Danmark, herunder de eventuelle gevinster Danmark får i NATO, fordi det danske rige omfatter Færøerne og Danmark.«

Fyri at fáa svar upp á tann síðsta spurningin vendi Anders Fogh Rasmussen sær til verjumálaráðið, sum púrasta vísir aftur, at Danmark nakrantíð hevur fingið nakað burturúr, at Føroyar vóru partar av danska ríkinum.

»Danmark har på intet tidspunkt unddraget sig udgifter i NATO som følge af Færøernes status og placering. En sammenkædning mellem geografisk beliggenhed samt strategisk betydning og ønsket om et mindre bidrag til Alliancen ville desuden være et klart brud på de grundlæggende principper i NATO«, sigur verjumálaráðið í svarinum.

Verjumálaráðið greiðir frá, at felags verjuætlanin í NATO hevur til endamáls at tryggja, at verjusamgongan kann loysa samlaðu uppgávurnar. Sum partur av hesum verður tillutað hvørjari tjóð nøkur styrkimát. Hesi styrkimát verða m.a. ásett fyri at býta byrðuna javnt millum londini. NATO fær javnan fráboðan um hetta og harafturat hendir ein jøvn eftirmeting av hvørjum landi, sigur verjumálaráðið.

Niðurstøðan er altso, at Danmark ikki hevur spart útreiðslur í NATO, við at Føroyar hava lagt land til verjuna av vesturheiminum í 50 ár. Hinvegin vísir verjumálaráðið á, at verjan av Føroyum framvegis er figgjað av dønum. Í 2002 kostaði verjan av Føroyum 144 milliónir krónur.

Jens Aage Jensby, verjumálaráðharri, á ferð í Føroyum. Upp undir føroyaferðina hjá Føroyanevndini, avvísti verjumálaráðið, at Føroyar hava spart dønum útreiðslur í NATO
Mynd: Jens K. Vang

Føroya-kortið var trumfur

Bæði Jens Otto Kragh og Uffe Elleman Jensen hava brúkt Føroyar sum trumf, tá samráðst hevur verið við NATO um verjuútreiðslurnar hjá Danmark. Tað vísti frágreiðingin um »Føroyar í kalda krígnum«, sum sostatt sáar iva um útsøgnina hjá verjumálaráðnum til føroyanevndina hjá Fólkatinginum

BAKGRUND
Ingi Rasmussen

Spurningurin um verjuútreiðslurnar hjá Danmark í NATO hevur javnan verið frammi síðstu árini. Og niðurstøðan hevur ikki altíð verið, at Føroyar einki hava vigað, tá gerast skuldi upp. Uppundir samráðingarnar við donsku stjórnina í 2000 royndi Føroya landsstýri at vísa á, at Danmark hevur spart risaupphæddir í NATO, tí Føroyar og Grønland eru partar av danska ríkinum. Sagt var, at frá 1976 til 1989 spardi danska stjórnin smáar 90 milliardir krónur í verjuútreiðslum til NATO, tí hon læt øki í Føroyum og Grønlandi frá sær. Somu árini læt stjórnin Føroyum og Grønlandi 60 milliardir í stuðli, og danska yvirskotið var sostatt 30 milliardir krónur. Segði landsstýrið.

Jenis av Rana, tingmaður, nýtir eisini øll høvi at vísa á, at blokkstuðulin er ongin ein olmussa, men eitt gjald fyri, at NATO brúkar føroyska jørð til sínar herstøðir.

Svartabók svarar

Hvussu er og ikki. Niðurstøðan hjá danska verjumálaráðnum, sum onki sigur seg hava spart í verjuútreiðslum til NATO upp á Føroyar, samsvarar ikki heilt við tað, sum kom fram í Svørtubók, frágreiðingini um Føroyar í kalda krígnum. Eitt av teimum fýra punktunum í frágreiðingini snúði seg um »at krevja eina gjølliga frágreiðing frá stjórnini um, hvussu herstøðirnar í Føroyum hava verið mótroknaðar dønskum útreiðslum.«

Tað eydnaðist ikki søgufrøðingunum Sámali Tróndi Finnson Johansen og Jákupi Thorsteinssyni at svara spurninginum í krónum og oyrum. Men í teim-um skjølum, sum Sámal Tróndur fann í amerikonskum skjalagoymslum kom kortini fram, at Danmark nýtti Føroyar og Grønland sum sjónarmið, tá verjuútreiðslurnar skuldu vigast.

Eitt, sum týðiliga bendir á tann bógvin, er ein fundur í november 1958 millum »Charges d'Affaires« L. Satterthwaite frá amerikansku sendistovuni í Keypmannahavn og danska uttanríkisráðharran Jens Otto Krag um uppseting av Loran-C støðini í Føroyum.

Ein býtishandil

Á fundinum kemur Krag inn á, at tað er ein samanhangur millum tær lágu verjuútreiðslurnar hjá Danmark og hetta at lata rættin til føroyskt og grønlenskt øki frá sær. Í roynd og veru legði hann tað beinleiðis fram soleiðis, at veruliga orsøkin til, at donsku verjuútreiðslurnar vóru so lágar, var at Danmark læt øki í Grønlandi og Føroyum frá sær til uppseting av hernaðarligu støðunum.

Í frágreiðingini »Føroyar í kalda krígnum« er eitt skjal endurgivið, sum er ein frágreiðing frá fundinum millum Krag og Satterthwaite. Eftir at Krag hevur sæð skjølini hjá sendistøðini um Loran-C støðina í Føroyum, sigur hann, at Danmark við gleði hjálpti NATO og gjørdi sítt til at uppfylla síni krøv við at geva NATO Føroyar og Grønland at ráða yvir. Hetta fekk donsku verjuútreiðslurnar at síggja betri út og gav meining. Og hann var glaður fyri at síggja, at hesin veruleiki var viðurkendur av amerikonsku stjórnini, er Krag endurgivin fyri at siga.

Fundurin snúði seg um at fáa danska góðkenning fyri Loran C støðina á Eiði við teimum hernaðarligu endamálum, ið har vóru. Tí fataði Satterthwaite hetta sum ein býtishandil. Hann svaraði, at hann var fegin um, at Danmark hevði ræði á Føroyum og Grønlandi, og at londini tískil vóru tøk til felags verju.

Hóast fundurin og diplomatiska spælið ikki beinleiðis avdúkar, um danir í veruleikanum seldu Føroyar, so vísir hetta, at eitt »Føroya-kort« tilvitað var brúkt sum ein trumfur hjá Danmark.

Føroyar vóru eitt gott kort hjá Danmark undir kalda krígnum. Kortið varð tikið fram, tá samráðst var um verjuútreiðslurnar til NATO
Mynd: Jens K. Vang

Uffe stuðlar

Hetta sjónarmið verður eisini stuðlað av Uffe Elleman-Jensen, sum í dagbók síni frá 1996 greiðir frá, hvussu hann nýtti Grønland og Føroyar í samráðingunum um donsku verjuútreiðslurnar í NATO.

Tað vísti seg eisini at hava størri áhuga hjá amerikanarum at tryggja sær atgongd til føroyska og grønlendska økið enn at trýsta donsku stjórnina til at økja um sínar verjuútreiðslur, so tær svaraðu til tær hjá øðrum londum í NATO, segði hann.

So hóast verjumálaráðið í dag er sannført um, at tað ikki hevur spart útreiðslur í NATO av Føroyum, so eru aðrar ábendingar í søguni um, at Føroyar í sær sjálvum vóru eitt gott kort.